# Lærarалønir ikki hildnar aftur

*Tvídrátturin millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið, sum kom í, tí Fíggjarmálastýrið hevur biðið Undirvísingar- og Mentamálastýrið halda lønum aftur, er nú av í fyrstu syftu, tí boð eru komin um, at allar lønir verða útgoldnar*

Dagfinn Olsen

Tað kom illa við hjá Føroya Lærarafelag, at Fíggjarmálastýrið longu 14. februar hevur biðið Undirvísingar- og Mentamálastýrið halda lønir hjá sáttmálasettum lærarum aftur, meðan samráðst verður.

Felagið og Karsten Hansen hava í leygardagsblaðnum viðmerkingar til málið. Men eftir at blaðið var farið il prentingar seinnapartin fríggjadagin kom fram, at lærarar hava einki at óttast, tí hesi boð eru komin til Føroya Lærarafelag frá Undirvísingar- og Mentamálastýrinum:

Til Føroya Lærarafelag Vísandi til telefonsamrøðu við formannin 24. februar 2000, verður við hesum sagt frá, at allar lønir í mars til lærarar í fólkaskúlanum verða goldnar sum higartil.

### Funnið semingfólk

Í gjár frættist, at Lærarafelagið hevur boðað lønardeildini hjá Fíggjarmálastýrinum frá viðvíkjandi semingsfólkum. Hvørji hesi eru, fekst tó ikki at vita.

## Ikki til verka 1. mars uttan løn

*Í samband við samráðingarnar millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið, sigur felagið m.a. í tíðindaskrivi, at Fíggjarmálastýrið hevur givið lønardeildini hjá Undirvísingar- og mentamálastýrinum boð um ikki at gjalda lønina fyri mars út til teir forútbetaltu sáttmálasettu lærararnar og at hetta er provokatión.*



Føroya Lærarafelag hevur boðað frá arbeiðssteðgi fyri allar limir sínar, sum kunnu fara í arbeiðssteðg, tvs. allar sáttmálasettar lærarar í fólkaskúlanum. Harafturat hava vit boðað frá blokadu.

Hetta er gjørt eftir reglunum í Høvuðsavtaluni millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Føroya Lærarafelag hevur hildið seg til reglurnar.

Men Fíggjarmálastýrið hevur longu 14. februar givið lønardeildini hjá Undirvísingar- og mentamálastýrinum boð um ikki at gjalda lønina fyri mars út til teir forútbetaltu sáttmálasettu lærararnar. Hóast Føroya Lærarafelag hevur mótmælt hesum, hava vit í dag fingið váttan fyri, at lønardeildin hjá UMMS ongi onnur boð hevur fingið. Tey eru í dag farin at fyrireika lønarútgjaldingarnar til lærarar í fólkaskúlanum.

Føroya Lærarafelag veit væl, at í Danmark verður lønin steðga upp undir arbeiðssteðg hjá forútløntum, men tá er tað eftir **greiðari** avtalu millum partarnar.

Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið hava onga avtalu um slíka manngongd.

Tí er hetta ein grov provokatión og brot uppá sáttmálan fyri teir sáttmálasettu lærararnar í fólkaskúlanum. Í sáttmálanum millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Lærarafelag stendur í § 4, stk. 4: Lønin verður goldin mánaðarliga .... og í seinasta lagi síðsta dag í mánaðnum, sum peningastovnarnir hava opið.

Hvat nú um semingsmaðurin útsetur arbeiðssteðgin eina viku?

Skal tann parturin av teimum sáttmálasettu lærarunum, sum eru forútlønt, arbeiða fyri onga løn?

Nei, tað verður av ongum!!

Nevnd Føroya Lærarafelags hevur tí samtykt, at um teir forútløntu sáttmálasettu lærararnir ikki hava lønina í seinasta lagi kl.10 týsdagin 29. Februar, fara teir undir ongum umstøðum til arbeiðis 1. mars.

Arbeiðsgevararnir tosa so søtt um spælireglar í samband við Høvusðavtalur.

Okkara roynd við Høvuðsavtaluni er, at tað er fakfelagið, sum skal halda seg til reglurnar, men arbeiðsgevarin/ Fíggjarmálastýrið kann gera, hvat tað vil.

Fíggjarmálastýrið gongur ongatíð undir nakrar spælireglar. Teir tulka reglurnar, sum tað passar teimum best.

Vit hava ikki plikt til at boða frá okkara uppskotum til semingsmenn fyrr enn týsdagin 29. februar.

Føroya Lærarafelag rennur ikki á leistum fyri Fíggjarmálastýrinum, sum støðan er nú.

**Føroya Lærarafelag**
**Elsa Birgitta P. Petersen**

## Gjalda ikki fyri nakað vit ikki fáa

*Karsten Hansen sigur í viðmerking til tíðindaskriv frá Lærarafelagnum, at boða fólk frá, at tey fara ikki til arbeiðis, so kunnu tey ikki vænta sær løn*

Dagfinn Olsen

Karsten Hansen skilir ikki, at Føroya Lærarafelag í tíðindaskrivi tosar um brot á avtalu og at Fíggjarmálastýrið ikki heldur spælireglur. Hann vísir til, at ongar reglur, ongin avtala, er á júst hesum økinum.

- Ein kann ikki bróta reglur, sum ikki eru til, sigur Karsten Hansen.

### Feløgini gjalda

- Vit kunnu ikki gjalda fyri nakað, vit ikki fáa, tí hetta snýr seg um skattakrónur. Fólk sum boða frá, at tey ikki fara til arbeiðis, kunnu ikki fáa løn, heldur Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri.



*Fólk sum boða frá, at tey ikki fara til arbeiðis, kunnu ikki fáa løn, heldur Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri*

Hann metir ikki, at nakað løgið er í, at Fíggjarmálastýrið longu 14. februar gevur lønardeildini í UMMS boð, tí lærarar boðaðu longu í summar frá ætlanum um arbeiðssteðg.

Í samaband við tíðarfreistina fyri lønarútgjalding, sum Lærarafelagið setir til týsdagin 29. februar klokkan 10, sigur Karsten Hansen, at hetta er teirra val.

- Men vanlig siðvenja er, at feløgini gjalda limum løn undir verkfalli, um tey hava pening til tess, men um tey gera tað, er ikki okkara borð, sigur Karsten Hansen.

### Fáa fyri eina viku

Lærarafelagið spyr hvat hendir, um semingsmenn útseta arbeiðssteðgin eina viku.

- Ja, vísir tað seg, at so er, so fáa fólk løn fyri ta vikuna, tey eru til arbeiðis, sigur Karsten Hansen.

Men í samband við prátið um avtalur og reglur og brot á hesar, staðfestir Karsten Hansen, at honum vitandi er eingin avtala við Lærarafelagið um hetta og at í Føroyum hava ongantíð verið reglur um, at fólk sum ikki fara til arbeiðis, fáa løn.

*Lærarafelagið og Karsten Hansen hava í leygardagsblaðnum viðmerkingar til málið*

# Føroyskar bøkur á enskum

*Enski bókaútgevarin Pamela Clunies Ross vitjar í hesum døgum í Føroyum fyri at kunna seg um føroyskar bókmentir. Ensamálið er at finna føroyskar bøkur at geva út á enskum máli. Í kvøld er rithøvundakvøld í Norðurlandahúsinum, har Pamela C. Ross eisini luttekur*

Dagfinn Olsen

Norðurlandahúsið hevur boðið Pamelu Clunies Ross til Føroya. Hon hevur bókaforlagið Mare's Nest, ið hevur givið út fleiri íslendskar bøkur, ið eru týddar til enskt.

Endamálið við at bjóða enska útgevaranum til Føroya, er at vekja áhuga hennara fyri føroyskum bókmentum, so møguleiki verður fyri at fáa hesar út á enkum máli.

Pamela C. Ross sigur seg ikki kenna stórvegis til føroyskar bókmentir, men hon hevur lisið Barbaru. Hon leggur tó dent á, at henda bók jú upprunaliga er skrivað á donskum. Hon sigur eisini, at hóast William Heinesen er á enskum, so er hann ikki kendir millum manna.

Hon heldur vera hugtakandi, at síðani umleið 1980 eru eini 800 bøkur komnar út á føroyskum.

Hon kennir Jørgen-Frantz Jacobsen og William Heinesen, men leggur tó dent á, at hon er mest áhugað í bókum, ið upprunaliga eru skrivaðar á føroyskum.



*Pamela Clunies Ross er enskur bókaútgevari, ið hevur givið eini 10 íslendskar bøkur út á enskum máli. Ætlandi verður tað sama nú roynt við føroyskum bókum*
***Mynd: Álvur Haraldsen***

Síðani 1995 hevur Mare's Nest givið út 10 íslendskar bøkur. Talan er ikki um stórar útgávur, men tær selja og ein áhugabólkur er til staðar.

Tó er tað so, at enska forlagið hevur fingið stuðul frá íslendskum myndugleikum og øðrum. Neyðugt er við umleið 50% í stuðli, um slík ætlan skal gerast veruleiki, tí tað er vágaverk hjá lítlum forlag at geva slíkar bøkur út.

Hóast bøkurnar koma út í Onglandi og USA, so er bert talan um upplag uppá 2000 bøkur. Men sjálvsagt ber til at endurprenta, skuldi tað verið neyðugt.

Eins og í øðrum høpum, t.d. í tónleikaídnaðinum, so er gongdin tann, at fólk eru troytt av teim stóru. Hugt verður nú í krókarnar, metir Pamela C. Ross.

Talan verður í fyrstu syftu um 2 bøkur, ið skulu týðast og gevast út á enskum. Pamela kennir enn ikki stórvegis til føroyskar bøkur, men ætlar at vitja bókasøvn og bókhandlar. Hon heldur tó, at rættast hevði verið at byrja við tveimum nýggjum føroyskum bókum.

Norðurlandahúsið stendur fyri vitjanini og er eisini til reiðar at hjálpa til fíggjarliga, men stjórin í húsinum, Helga Hjörvar, væntar eisini, at onnur eru áhugað at seta pengar í.

Í kvøld luttekur Pamela Clunies Ross á rithøvundakvøldinum, sum verður í Norðurlandahúsinum.

# Føroysk leikritaskriving

*Gríma hevur skipað fyri skeiði í leikritaskriving. Hetta er liður í at fáa føroyskan dramatikk á pall, nú fyrireikingar eru til føroyskan tjóðpall. Eisini er hetta liður í útskrivaðu leikritakappingini*

Dagfinn Olsen

Fyrsta umfar av leikritaskeiðnum var í oktober í fjør. Tá vóru eini 6 - 8 luttakarar. Seinna umfar hevur verið nú, og eini 3 luttóku.

Tað eru Eyðun Johannesen og Jørgen Ljungdal, ið hava staðið fyri skeiðunum. Teir hava áður m.a. samstarvað um uppsetingina av Glataðu Spælimonnunum.

Fleiri orsøkir eru til, at slíkt skeið verður hildið.

Gríma útskrivaði fyri tíð síðani leikritakapping og kundu áhugaðir høvundar á skeiðunum fáa vegleiðing og hugskot. Eisini eru fyrireikingar til føroyskan tjóðpall. Eyðun Johannesen byrjar í apríl í starvi, sum m.a. fevnir um at byggja hetta upp. Hann er sera áhugaður í at fáa til vega føroyskar leikir.

### Lættari at skilja

Jørgen Ljungdal hevur tikið sær av at vegleiða í skrivliga arbeiðinum.

Eyðun Johannesen hevur síðani sett leikbrot upp á pallinum. Hetta ger tað lættari at skilja hjá høvundunum.

Ofta sæst ikki, um leikbrot rigga sum ætlað, fyrr enn tey verða framførd á palli, siga tey í Grímu.

Bæði Gríma og Eyðun Johannesen eru greið yvir, at tað er ikki sum at siga tað at skriva leik, men tó vóna tey at fáa føroyskan nútíðar leik á pall framyvir.



*Eyðun Johannesen og Jørgen Ljungdal hava havt skeið í leikritaskriving*
***Mynd: Jonhard Hammer***



***Mynd: Álvur Haraldsen***

## Framsýning

*Mikudagin letur Pauli Vang upp listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík*

Mikudagin klokkan 15 letur upp listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Tað er Pauli Vang, ið sýnir fram málningar. Mest eru tað landslagsmyndir, ið Pauli málar.

Opið er frá mikudegnum 1/3 til sunnudagin 6/3 2000.

Mikudag til fríggjadag er opið frá 15 til 19. Leygardagin er opið frá 14 til 20 og sunnudagin frá klokkan 14 til 18.





*Heidi og Sólvá vóru báðar føddar 29 februar fyri fýra árum síðani*



*Sólvá saman við pápa sínum, Kaj, sum lovar stóran føðingardag í dag*

# Fyrsti føðingardagurin

*Pápin lovar stóran føðingardag, nú Sólvá kann halda sín fyrsta veruliga føðingardag*

Eyðun Klakstein
Myndir: Álvur Haraldsen

Í ár er leypár, og tað hevur við sær, at fólk sum sum eru født 29. februar, aftur sleppa at halda veruligan føðingardag.

Soleiðis er eisini hjá teimum børnum, sum vórðu født 29. februar fyri fýra árum síðani, og tey sleppa sostatt at halda sín fyrsta rættiliga føðingardag í dag.

Ein av teimum er Sólvá Lávík, og foreldrini lova stóran føðingardag.

– Vit ætla at gera meira burtur úr hesaferð, og vit hava longu fingið pakkar sendandi frá familju, sigur Kaj Johannesen. Mamma Sólvu eitur Annika Lávík.

Sólvá hevur higartil hildið føðingdagin hjá sær 28. februar.

– Rættast hevði helst verið at hildið dagin 1. mars, men fyri at hon ikki skal villast í tveimum ymiskum mánaðum, so plaga vit halda dagin 28. februar, sigur Kaj.

### Sól skein

Kaj sigur, at tey høvdu ikki lagt seg eftir at fáa barn júst 29. februar, men hann er ikki keddur av, at tað endaði við tí.

– Beint tá Sólvá kom í verðina, lat eg eitt vindeyga upp á Landssjúkrahúsinum og tók ein djúpan andadrátt. Tá lætti mjørkin akkurát, og sólin fór at skína. Tí kallaðu vit hana Sólvá, greiðir Kaj frá.

– Og so var kvotan fyri at uppkalla foreldur langt síðani brúkt, leggur hann afturat.

Sama kvøld, sum Sólvá var komin í verðina, skuldi Kaj spæla á konsert í Norðurlandahúsinum. Hann fór heim at sova eftir føðingina, og kom ov seint til konsertina. Men at fólk bíðaðu einar 10 minuttir eftir honum, legði stolti pápin ikki so nógv í.

Sólvá gongur í barnagarði Sankta Josefs, og har gongur eisini Heidi, sum somuleiðis fyllir 4 ár í dag, men sum fyrstu ferð rættiliga kann halda føðingardagin á rætta degnum.

Vit ynska teimum, og øllum hinum sum hava føðingardag í dag, tillukku við degnum.

## Viðmerking:

# Øll skulu viðgerast eins

Seinasta leygardag skrivaði Edvar Joensen blaðmaður nakað í samband við at Næraberg kom á Klaksvík.

M.a. skrivar hann: »Fólk vóru so smátt farin at skottast eftir, hvar móttøkunevndin mundi vera. Men har var eingin. Eitt sindur kollut *varð hildið* (undirstrikað av undirritaða). Væl var hetta eitt brúkt, leigað skip, men klaksvíkingar hava útnevnt tað til flaggskipið í flotanum, so har átti at verið gjørt okkurt burturúr«.

Siðvenja hevur verið og er í Klaksvík, at almennar móttøkur hava verið og eru fyri nýbygningum

Av og á hevur verið tosað um, um hetta skal broytast, men hildið hevur verið, at best er sum er, tí torført verður at stýra, tá fleiri brúktir bátar og skip koma millum ár og dag.



Aðrar siðvenjur hava eisini verið umrøddar, eitt nú, skulu vit flaggað, tá onkur hevur undan føðingardag, kansaka ein fyrrverandi býráðslimur, kanska ein – sum onkur heldur – hevur størri týdning enn annar, hevur rundan dag. – Hetta verður ikki gjørt.

T.d. hevur fólk ringt til okkara, tá onkur er farin, hvussu tað ber til, at býráðið ikki hevur flaggið á hálvari stong. – Her hava vit ta siðvenju, at flaggið er á hálvari stong, tá jarðarferð er. – Tað er lættari at fylgja.

### Vit kenna týdningin av fólki við dirvi og áræði

Annað er, tá okkara frægi ítróttarungdómur vinnur sær meistarheiti. Hvussu verða hesi heiðrað! Her hevur kanska verið ilt at fylgt við, men vit hava roynt, og vóna at tað enn betur verður fylgt upp í framtíðini.

Umráðandi er, at vit royna at viðgera øll eins. – Eitt nú er skipið Norðborg, fyrrverandi Gardar, farið til fiskiskap, uttan at koma til Føroyar. – Hinvegin fekk Christian í Grótinum, sum var nýbygningur úr Kili almenna móttøku.

Sjálvandi ynskja bæði býráðið og allir klaksvíkingar einum tílíkum megnartaki og tílíkum átøkum góða eydnu – tað hava vit eisini gjørt á annan hátt – vit eru ikki sørt ernir av tílíkum dirvi og áræði, og eingin kennir tað betri enn vit, hvønn týdning hetta hevur fyri bý okkara, og fegnast um, at felagið J. F. Kjølbro við nýggjum og yngri kreftum framvegis er ein hornasteinur í samfelagi okkara.

Ofta er lætt hjá fremmandamanni, sum eina ferð av og á er í Klaksvík, at gera seg inn á siðvenjur, kanska uttan tó at hugsa seg nóg væl um.

**Jógvan við Keldu,**
**borgarstjóri**

# Avmarkingar á ymiskum marknaðum

Marknaðurin í ES og USA vil um 10-20 ár mangla fisk. Hetta sigur norski marknaðargranskari Børn Eirik Olsen á eini aliráðstevnu, sum norska granskingarráðið skipaði fyri í seinastu viku.

ES og USA avmarka atgongdina hjá triðjalondum til sínar marknaðir við reguleringum, tolli og kvotum, men um ikki so langa tíð vera hesi londini kanska noydd til at stimulera innflutningin av fiskavørum.

Orsaka av avmarkingum á marknaðunum í ES og USA hevur m.a. norska fiskivinnan lagt dent á at marknaðarføra seg á asiatiskum marknaðum og væntandi fer hesin marknaður at vaksa munandi komandi árini, tískil vil minni verða eftir til marknaðin í ES og USA.

Í dag keypa asiatisk lond 40 % av øllum fiski, sum verður útfluttur. Norski granskarin metur, at um nøkur ár so er hesin parturin øktur til 2/3 (Intrafish).

**www.sosialurin.fo**


Coca-Cola

COCA COLA CUP

B68 bjóðar øllum gentum og dreingjum at gera lið til kapping í fótbólti í ítróttarhøllini í Runavík í døgunum 4. og 5. mars 2000

Reglur o.a.

- Spælt verður við stórum málum (smápiltamálum).
- Á hvørjum liði eru 5 leikarar, 4 útileikarar og 1 málmaður.
- Loyvt er at hava 1 eykaleikara.
- Luttakarakostnaður: kr. 200,- fyri hvørt liðið.
- Øll liðini skulu hava rættulig fótbóltsnøvn, sum t.d. B68, HB, Liverpool, Pharma osfr.

Aldursbólkar

1. Pinkulingar (f. 92 og yngri)
2. Smápiltar (f. 90-91)
3. Piltar (f. 88-89)
4. Smádreingir (f. 86-87)
5. Dreingir (f. 84-85)
6. Gentur (f. 90 og yngri)
7. Gentur (f. 88-89)
8. Gentur (f. 86-87)
9. Gentur (f. 83-85)

Tilmelding

Fer fram á tel. 448068/ 448274 og 447644 millum kl. 19.00-21.00

Seinasta freist mikukvøldið 1. mars.

Sosialurin - 311820

Heiðursmerkir o.m.a. frá Coca Cola

- Heiðursmerkir til nr. 1, 2 og 3
- T-shirts til nr. 1 í hvørjum bólki
- Ein fótbólt til besta málskjútta í hvørjum bólki
- Coca Cola til allar leikarar

Stuðul til kappingina

Coca-Cola

Tofta Ítróttarfelag